


**Norðoyggjar:**

**Klaksvíkar Autolakering**
Klaksvík, tel 458787

**Bilservice**
Klaksvík, tel 459393

**E.Z. Verstaðið**
Klaksvík, tel 566878

**Auto Fjósið**
Viðareiði, tel 451162

**Autoshine**
Klaksvík, tel 457474

**Eysturoy:**

**Dekksentrið**
Saltangará, tel 475500

**B.B.R. Service**
Lambareiði, tel 449111

**Normek**
Norðagøta, tel 442002

**Sandoy:**

**Shell-Støðin**
Sandur, tel 361046

**Suðuroy:**

**Shell-Støðin**
Trongisvágur, tel 371466

**Shell-Støðin**
Vágur, tel 373175

**Streymoy:**

**Berg Motors**
Tórshavn, tel 313535

**Bilrøkt**
Tórshavn, tel 588880

**Bilasølan**
Tórshavn, tel 315354

**Akfarssølan í Hornabø**
Tórshavn, tel 320322

**Shellstøðin Frælsið**
Tórshavn, tel 312112

**Dekksentrið**
Tórshavn, tel 475500

**Super Dekk Service**
Tórshavn, tel 314975

**V.R.-Bilar**
Tórshavn, 322110

**Wenzel**
Tórshavn, tel 354500

**Norðbil**
Tórshavn, tel 363738

**Norðcar**
Tórshavn, tel 308080

**Vágoy:**

**Bilverkstaðið**
Miðvágur, tel 332727



Shell HELIX
– helst besta smyrjiolja í heiminum

Føroya Shell


veitst tú ikki tað?
Sosialurin

# Fríkendur fyri drápsroynd

**Ein maður, sum hevur verið í Føroya Rætti alla síðstu viku fyri álvarsligar ákærur, slapp so væl sum hugsast kundi**

NEVNINGATING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í alla farnu viku hevur ein maður sitið á ákærubonkinum í Føroya Rætti við álvarsligum ákærum hangandi yvir sær.

Men hann slapp so væl, sum hugsast kundi.

Hann varð ákærdur fyri drápsroynd og fyri at hava roynt at seta eld á ein mann og at brenna húsini niður, sum maðurin búði í. Í hesum sambandi skal hann hava sett fólkini, sum inni vóru, í álvarsligan vanda.

Varð hann dømdur sekur, kundi hann fingið fleiri ár í fongsul.

Men hann varð fríkendur fyri drápsroynd, men ístaðin skal hann í fongsul í tvey ár og tríggjar mánaðir fyri at hava roynt at framt harðskap av serliga ráum og grovum slagi.



*Fríggjadagin varð ein maður fríkendur fyri drápsroynd og fyri at hava roynt at høgt eina øks í høvdið á einum manni. Men hann varð dømdur fyri at hava roynt at fremja serliga ráðan harðskap*

## Tók fleiri tímar

Tað hendi eina náttina síðsta summar, tá ið maðurin breyt seg inn í eini sethús við eini øks, einum dunki við bensini í og einum reipi.

Fútin sigur, at ætlanin var at seta eld á ein mann, at seta øksina í høvdið á honum og at brenna húsini niður.

Men tað noktar maðurin fyri, tí hann sigur, at ætlanin var bara at ræða mannin.

Alla vikuna hava verji og ákæri ført síni sjónarmið fram og klokkan gott 10 fríggjamorgunin var komið so langt, at tað var klárt hjá teimum 12 nevningunum at fara undir at viðgera spurningin um hann var sekur ella ikki.

Tilsamans høvdu nevningarnar 22 spurningar at taka støðu til og tað kravdi sítt, tí tað tók teimum yvir seks tímar at koma til eitt úrslit.

Nevningating verður brúkt, tá ið revsingin kann verða yvir fýra ár í fongsli.

Døma nevningarnir ein ákærdan sekan, kann tann løgfrøðiligi dómarin ógilda avgerðina, heldur hann, at prógvini eru ikki nóg góð.

Men fríkenna nevningarnar ákærda, stendur avgerðin við makt.

## Fríkendur

Og úrslitið fríggjadagin varð, at maðurin varð fríkendur fyri drápsroynd.

Hann var eisini fríkendur fyri at hava ætlað at brúkt øksina til at meiðsla mannin við. Hinvegin varð hann dømdur fyri at hava roynt at framt harðskap av serliga ráum og grovum slagi, tí hann varð kendur sekur í at hava roynt at seta eld á mannin.

Hann varð eisini kendur sekur í at hava roynt at seta eld á sethúsini, hann breyt inn í og í hesum sambandi, hevði hann sett lívið á manninum í álvarsligan vanda.

## Fleiri ákærur

Afturat teimum álvarsligu ákærunum fyri manndráp og eldáseting, varð hann eisini ákærdur og dømdur fyri at hava koyrt skít við ongum koyrikorti í einum bili, hann hevði stolið og fyri at hava rent á tveir aðrar bilar.

Og fyri at fáa alt við, varð hann eisini dømdur fyri at hava stolið ein kassa við 17 gullølum í, tvær tvingur, 18 dunkar av sjampoo, tveir dunkar av sápu og fyri einar 3000 krónur av mati úr eini frystiboks heima hjá nøkrum fólkum.

Hann hevði eisini ein treytaðan dóm upp á 50 dagar í fongsul hangandi yvir høvdinum.

Tá ið avgerðin er tikin, um hann er sekur ella ikki, skulu nevningarnir so aftur gera av, hvussu langa revsing, hann skal hava.

Í hesum førum hava teir 12 nevningarnir eina atkvøðu í part og tann løgfrøðiligi dómarin hevur 12 atkvøður. Tað merkir, at kemur dómarin til eina niðurstøðu, krevst bara at ein nevningur er samdur við honum, so verður tað avgerðandi.

Men siga nevningarnir eitt og dómarin eitt annað, er tað tann linari dómurin, sum stendur við.

Og tá ið alt so varð talt saman, varð hann dømdur at sita í tvey og tríggjar mánaðir og hann sleppur ikki at taka koyrikortið tey næstu fimm árini.

Og tað var so væl sloppið, sum hugsast kundi, tí varð løgfrøðingar høvdu hálvavegna fyrireikað seg til at hann kundi fingið eini sekssjey ár í fongsli, varð hann dømdur sekur í øllum ákærum.

Avgerðin um hann er sekur ella ikki, kann ikki skjótast inn fyri hægri rætt, men hægsti rættur kann verða biðin um at endurskoða longdina á sjálvari revsingini.

Tann ákærdi gjørdi av at taka við dóminum og rættурin gjørdi eisini av, at hann skal beinleiðis í fongsul at sita revsingina av sær.

## Fótbóltskappingin







**Heilt nýggj og øðrvísi lás!**
Høg góðska og tryggleiki uttan nýtslu av lyklum. 10 ymiskar kotur, vel tølini (1-10) sjálv/-ur. Passar til vanligar lásakassar. Kann setast í inn- og úthurðar. Tolir veður og vind. Kann latast upp bæði uttanífrá og innanífrá við kotu. Kann eisini fáast við alarmskipan.
Vælegnað til barnafamiljur, almennar stovnar og fyritøkur. 2 ára garanti

Valdemar Lützen Byggibúð
Skálatrøð 14 Tel 30 10 20 · vlb@vlb.fo